Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bárður á Steig Nielsen, løgtingsmaður

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Sjúklingahotellið í Keypmannahavn

Spurningar:

1. Hvør er ætlanin hjá landsstýrinum við sjúklingahotellinum í Keypmannhavn?
2. Er landsstýrið sinnað at samstarva við donsku stjórnina um at víðka um sjúklingahotellið?

Viðmerkingar:
Sjúklingahotellið í Keypmannahavn hevur í longri tíð havt plássmangul, og trupult hevur verið at húsa teimum sjúklingum og avvarðandi, ið hava havt tørv á tí. Tí er ynskiligt at fáa upplýst, hvørja ætlan landsstýrið hevur at loysa hendan trupulleikan, og somuleiðis um landsstýrið er sinnað at samstarva vit donsku stjórnina um hetta málið.

Á Løgtingi, 12. september 2025

Bárður á Steig Nielsen